# ri enn kalltoskur



*undinum, at Ásmundur Guðjónsson, sum greiddi frá granskingarkjarnunum, sum vði avgjørt at seta á stovn*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Granskingarkjarnin innan veiðitøkni, sum Fiskimálaráðið setti á stovn, verður nú partur av eini stórari ES-verkætlan, sum byrjar fyrst í komandi ári.

Tað veit Bjarti Thomsen, fiskifrøðingur og granskari innan veiðitøkni, at siga.

### Havbotnurin

- Í einum av sínum granskingarætlanum setti ES 15 miljónir krónur av til at menna fiskireiðskap, soleiðis at minkast kann um ávirkanina á havbotnin og tað, sum har livir.

Bjarti veit at siga, at granskarar úr fleiri londum í Evropu skulu tey næstu stívliga trý árini arbeiða saman um at menna tílíkan reiðskap og fiskitøkni.

- Ætlanin er í fyrsta lagi at menna tóv-reiðskap, eitt nú vanligu botntrolini, bummtrol og skeljadregg.

Granskarin vísir á, at føroyska luttøkan kemur at snúgva seg um botntrol, har ætlanin í størstan mun er at arbeiða við nýggjum trolgrunnum – og at fáa trollemmarnar upp frá botni.

- Fiskirannsóknarstovan gjørdi í fleiri ár royndir við einum ”rullandi” trolgrunni eftir hugskoti frá Líggjasi Hansen, sála, og hetta arbeiði verður eisini við í nýggju ES-verkætlanini.

### Samstarv

Bjarti Thomsen sigur, at føroyingar ikki uttan víðari kunnu verða partur av og fáa fígging í samband við eina ES-verkætlan.

- Fyri at loysa henda trupulleika samstarvar Fiskirannsóknarstovan í hesi verkætlan við danskar granskarar.

Hann sigur, at av teimum 15 miljónum krónunum, sum ES hevur sett av, fær danski hópurin 1,3 miljónur krónur, harav føroyingar fáa 305.000 krónur í sín part.

Bjarti Thomsen sigur, at verkætlanin hevur fingið heitið, ”DEGREE”, sum er ein stytting fyri ”Development of fishing Gears with Reduced Effects on the Enviroment.

### Atgongdin

- Verkætlanin byrjar fyrst í komandi ári, og granskarin heldur avgjørt, at eitt av endamálunum við føroyskari gransking má vera at sleppa upp í part í altjóða høpi og á henda hátt fáa atgongd til vitan, útgerð og fígging, sum annars ikki er atkomilig.



*Kanningar hjás Fiskeriforskning í Noregi vísa, at verður fiskur kruvdur beinanvegin – og áðrenn hann yvirhøvur er blóðgaður, bløðir hann minni*
*Mynd: Rógvi Mouritsen*

# Blóð í fiski merkir mistar inntøkur

**Toskur má blóðgast stutt eftir, at hann er komin inn á dekkið, um hetta ikki skal ganga útyvir dygdina á fiskinum. Í dag veiða stóru og effektivu skipini so nógvan fisk upp á stutta tíð, at eingin møguleiki er at blóðga fiskin, sum tískil missir inntøkur á marknaðinum**

BLÓÐGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Kjak um blóðging er ikki eitt nýtt fyribrigdi í Føroyum, minni enn so.

Flestu, sum fáast við fisk, vita, hvønn týdning tað hevur, at fiskur verður blóðgaður, meðan hann enn er livandi.

### Kanning

Í blaðnum hjá Fiskeriforskning í Noregi herfyri er ein grein um týdningin av, at fiskurin verður blóðgaður livandi.

Víst verður á, at nógv skip eru so stór og effektiv í dag, at manningin hevur smáar møguleikar at blóðga fiskin.

Avleiðingarnar eru, at hvíta fiskakjøtið verður reydligt á liti, og tá kann fiskurin ikki seljast á marknaðum, sum gjalda mest fyri fiskavørurnar.

Fiskeriforskning hevur gjørt eina røð av kanningum av teimum blóðgingarhættum, sum í dag eru vanligir umborð á skipum.

- Kanningarnar vísa, at fiskur, sum er tikin við snurriváð, eigur at verða blóðgaður í seinasta lagi 30 minuttir eftir, at hann er komin inn á dekkið - og ikki seinni enn ein tíma eftir, sigur granskarin, Leif Akse.

Hann vísir á, at blóðgingin merkir, at tær stóru blóðæðrarnar í strupanum verða skornar av, soleiðis at blóðið rennur út.

### Rennandi sjógvur

Kanningarnar vísa, at besti hátturin fyri at varðveita hvíta litin í fiskakjøtinum er at blóðga fiskin og síðan lata hann bløða út í rennandi sjógvi í minsta lagi ein hálvan tíma, áðrenn hann verður kruvdur.

Kanningarnar vísa eisini, at verður fiskurin kruvdur beinanvegin – og áðrenn hann yvirhøvur er blóðgaður, bløðir hann minni.

- Skipini eiga at hava útbúnað sum ger tað møguligt at blóðga og lata fiskin bløða út í sjógvi – so hvørt, sum fiskurin kemur inn á dekkið.

### Ikki prógvað

Granskarin vísir á, at umborð á nøkrum skipum halda menn, at fiskurin bløðir væl út, um hann verður kruvdur beinanvegin og síðan koyrdur í rennandi saltvatn.

- Men hetta er higartil ikki prógvað, sigur granskarin, sum heldur, at neyvari kanningar mugu gerast av hesum.

Teir, sum hava fíggjað kanningararbeiðið hjá Fiskeriforskning, eru Fiskeri-og Havbruksnæringens Forskningsfond í Noregi og Norges Råfisklag.